# Mentamálaráðið
ALTJÓÐA SKRIVSTOVAN

## ES FULLTRÚI

**Mentamálaráðið er í ferð við at menna útbúgvingarsamstarvið við ES innan Lívlanga Læring rammuskránna. Nýtt starv er tí leyst at søkja til Altjóða Skrivstovuna at seta 1. august 2007.**

**Førleikakrøv**
- kandidatútbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi
- góðar málførleikar bæði í skrift og í talu, serliga í føroyskum og enskum
- góðar samskiftisførleikar
- góðar teoretiskar og analytiskar førleikar
- vitan um og áhuga fyri útbúgvingarøkinum í Føroyum, í ES og í altjóða høpi
- royndir við verkætlanarleiðslu er ein fyrimunur.

Vit rokna eisini við, at umsøkjari er opin og virkin, er tænastusinnaður og dugir at arbeiða sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum.

**Starvsøki**
Nýggja starvið skal vera við til at styrkja støðuna hjá Altjóða Skrivstovuni, sum eisini fer at virka sum føroyska skrivstovan (National Agency) fyri stóru ES-útbúgvingarskránna Lívlong Læra.

**Høvuðsuppgávurnar fevna m.a. um at:**
- kanna og upplýsa um møguleikar fyri føroyskari luttøku í ES-útbúgvingarskránni.
- hava umsjón við og taka lut í ES samstarvi hjá Altjóða Skrivstovuni í samstarvi við Mentamálaráðið og onnur á økinum
- taka lut í viðkomandi ES útbúgvingarnetverkum
- fáa til vega tilfar, vitan og upplýsingar um útbúgvingarskránna Lívlong Læra hjá ES og kunning í hesum sambandi gjøgnum skeið, fyrilestrar, fundir, tíðindaskriv, internet v.m.
- kunna um møguleikar hjá føroyskum skúlum, lærustovnum o.ø. at taka lut í ES útbúgvingarverkætlanum
- røkja dagligt samskifti við fólk, stovnar og skúlar innan útbúgvingarøki o.ø. og hjálpa til at fáa samstarv/avtalu í lag
- taka lut í føroyskum og útlendskum arbeiðsbólkum innan økið

Starvið verður partur av einum toymi, ið skal samstarva við m.a. fulltrúa við ES-málum í Mentamálaráðnum, sum yvirskipað stílar fyri ES-útbúgvingarsamstarvinum, eins og við onnur, sum arbeiða við ES-granskingar- og útbúgvingarsamstarvi.

**Vit bjóða**
- eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti innanlands og uttanlands
- arbeiði á einum høgum fakligum stigi, og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning
- eitt liðiligt arbeiðspláss, sum leggur dent á sjálvstøðugt arbeiði

Talan er um starv við nógvari ferðing og uppihaldi uttanlands.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v., ummælum o.ø. skal sendast til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. apríl 2007, 16.00. Setanarsamrøður verða í viku 18 og 19.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Kristionnu Sjóvará Jacobsen, fulltrúa í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 36, ella Holger Arnbjerg, leiðara fyri Altjóða Skrivstovuni á tlf. 52 20 65.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Heimasíða Mentamálaráðsins er: www.mmr.fo
**Altjóða Skrivstovan** er savningarstað fyri vitan um útbúgvingar-, granskingar- og stuðulsmøguleikar uttan fyri Føroyar. Meira fæst at vita um Altjóða Skrivstovuna við at vitja heimasíðuna www.ask.fo.

---

## Toll- og Skattstova Føroya

# Útgjald av frítíðarløn 2. mai 2007

Ynskir tú at broyta kontunummar, skal tað boðast frá í seinasta lagi 11. apríl 2007. Annars verður frítíðarlønin flutt á somu kontu sum í fjør.

Fráboðanarskjal fæst niðanfyri ella á www. tollskatt.fo., eisini ber til at ringja á tlf 35 26 00.

Frítíðarløn sum ikki er úttikin 1. mai árið eftir fellir aftur í frítíðargrunnin.

Fráboðanin skal undirskrivast og sendast til:

**Toll- og Skattstovu Føroya**
Postrúm 2151
FO-165 Argir

| | |
|---|---|
| **P-tal:** | |
| **Navn:** | |
| **Bústaður:** | |
| **Postnr. og bygd/býur:** | |
| **Peningastovnur:** | |
| **Kontonummar:** (bert í føroyskum peningast.) | |

______________________ , / -2007

______________________
Undirskrift

---

MATRIKULSTOVAN 1948

# Adressur í Svínoy

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri **Svínoy** góðkend.

*Skráin er almenn og tøk á www.matrikul.fo.*

**Landsadressuskráin**
Boks 2048
Tlf. 357900 • Fax 357901
FO-165 Argir
www.matrikul.fo • post@matrikul.fo

---

## Felag Tænastumanna Landsins

Felag Tænastumanna Landsins heldur nú til á **Traðartúni 24 á Argjum**.

Tað ber til at fáa fatur á felagnum við at skriva til:

**Postboks 2234 · 165 Argir**

ella teldupost: madul@post.olivant.fo

Ella ringja til formannin Mariu á Dul á fartlf. 225203 – telefonin svarar hvønn hósdag kl. 17.00 – 18.00.

---

## Frá Arbeiðsmannafelagnum Framtíðin í Vági.

Ársaðalfundurin verður í Framtíðini tórsdagin 12. apríl kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Arbeiðsmannafelagið Framtíðin.**

---


# Arbeiðshandskar
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820